**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogur

## til Sambýlini á Mýrini

Innan Almanna- og heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við fyribils tænastu á Sambýlunum á Mýrini 4-6 í Hoyvík, er 1 pedagogstarv leyst at søkja til setan 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt fulltíðarstarv, og er arbeiðstíðin 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskfitisarbeiði.

Sambýlini á Mýrini eru heim hjá 10 vaksnum menningartarnaðum búfólkum.

Arbeiðið fevnir millum annað um at vegleiða búfólki í øllum tí, sum tey hava tørv á. At menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivna og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkinum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við okkara avvarðandi og starvsfelagar, er sjálvstøðug/ur, likamliga og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar, er ágrýtin og opin fyri nýhugsan.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og lønt stigini, 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Nærri fæst at vita um størvini frá Hans E. Fuglø, leiðara á tlf. 211478.

Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Sambýlini á Mýrini**
Att.: Leiðarin
Á Mýrini 4-6
188 Hoyvík

Umsóknarfreist er 20. februar 2006 kl. 12.00.

## Suðuroyar Sparikassi

# Eykaaðalfundur

Boðað verður við hesum til eykaaðalfundar í Suðuroyar Sparikassa mánadagin 27. februar 2006, kl. 18.00 á Hotel Bakkanum, Vágur, við hesi dagsskrá:

1) Val av fundarstjóra.
2) Avgerð um umlegging av Suðuroyar Sparikassa til partafelag.
3) Ymiskt.

Til avgerð sambært pkt. 2 krevst sambært §10 í viðtøkum sparikassans, at minst helmingurin av umboðsráðslimunum eru á fundi, og at í minsta lagi 2/3 teirra atkvøða fyri.

Fráboðan um eykaaðalfundin verður eisini send umboðsráðslimunum við post saman við fusiónsætlan, uppskoti til viðtøkur fyri framhaldandi partafelagið og nýstovnaða grunnin, fusiónsfrágreiðing, felags roknskaparuppstilling og byrjunarfíggjarstøðu, umframt útsøgn frá metingarmonnum viðvíkjandi ætlan um samanlegging pr. 1. januar 2006 millum Suðuroyar Sparikassa og P/F SPARSU.

Sambært § 134 í partafelagslógini, liggja nevndu skjøl frammi á skrivstovum sparikassans, saman við ársroknskapum fyri Suðuroyar Sparikassa og P/F SPARSU.

Víst verður til nevndu skjøl, harundir uppskotið til nýggjar viðtøkur fyri framhaldandi partafelagið, har ið ásetingar m.a. eru um ognaravmarking í § 5, atkvøðuavmarking í § 12, stk. 2 og rætt hjá ábyrgdarum at skifta ábyrgdarfæ teirra til partapening ella at fáa ábyrgdarfæið útgoldið kontant í §§ 17 og 21.

Vágur, hin 9. februar 2006

**Umsjónarráðið**

**SUÐUROYAR SPARIKASSI**
Postboks 2 · FO-900 Vágur
Tel. 359870 · Fax 359871

## Reyði Krossur Føroya

**Skeið í 1. hjálp**
**um undirtøkan er nóg stór**

**12. tímar grundskeið:**
24. og 25. februar og 5. mars 2006
**Kostnaður kr. 700,-**

**20. tímar víðkað skeið:**
(fortreyt grundskeið)
12., 17., 18., 24., og 25. mars 2006
**Kostnaður kr. 1.050,-**

**3 tímar endurútbúgving:**
(grundskeið ikki eldri enn 3 ár)
26. februar 2006 kl. 14.00 - 17.00
**Kostnaður kr. 125,-**

**8 tímar sálarlig 1. hjálp:**
13. og 19. mars 2006
**Kostnaður kr. 400,-**

**Tilmelding seinast 15. februar 2006:**
Navn:_______________
Bústaður:_______________
Tlf.:_______________
Teldupostadr:_______________

☐ Endurútbúgving ☐ 12 tímar grundskeið
☐ Víðkað skeið ☐ Sálarlig 1. hjálp
☐ Meldi meg sum SAMARIT

Okkara adressa er:
**Rey i Krossur Føroya**
Postbox 1015, 110 Tórshavn
ella teldupostadr: redcross@redcross.fo
sí www. redcross.fo

Havnar SJÚKRAKASSI

# Umboðsráðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 16. mars 2006.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val og 1 umboð í Nólsoyar valdømi er uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 28. februar 2006.

**Havnar Sjúkrakassi**
Tórshavn, 8. februar 2006


Spf. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰*
*annars sambært avtalu.*
*Nýggj vøruskrá fæst!*
Sjónband - 31 77 74



FAROE DIVE.fo
**Kavaraskúli**
Ring/skriva og fá faldara ókeypis!
Tlf. 218929 ella 458939
www.faroedive.fo



PADI



KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini



WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22



# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480